**Fylgiskjal 1**

# SAMANDRÁTTUR AV UMSÓKNUM

## 1. Alment um umsóknina

a) Umsóknarøki, lýst við landafrøðiligum krosstølum, avmarkað við breiddar- og longdarstigum víst við heilum minuttum og við ávísing til teigatøl.

b) Navn og bústaður hjá øllum luttakarum í umsóknini við upplýsing um luttøkupart (%) og um, hvønn leiklut hvør einstakur luttakari hevur í møguligum samtaki (fyristøðufelag og/ella luttakari).

c) Navn og bústaður hjá tí persóni, ið umboðar umsøkjaran mótvegis myndugleikanum í Føroyum, meðan umsóknin verður viðgjørd.

## 2. Arbeiðsskrá og føroysk luttøka í virkseminum

Fyri hvørja umsókn verður her givin ein stuttur samandráttur um hesi viðurskifti:

a) Uppskot um loyvistíðarskeið.

b) Uppskot um arbeiðsskrá.

c) Uppskot um, hvussu umsøkjarin vil stuðla øðrum kanningum við atliti at framtíðar oljuleiting á Føroyaøkinum.

d) Uppskot um, á hvønn hátt og í hvønn mun umsøkjarin vil tryggja veruligar møguleikar fyri føroyskari luttøku í kolvetnisvirkseminum.

## 3. Lýsing av økinum, ið søkt verður um

a) Stuttur samandráttur (í mesta lagi ein A4-síða fyri hvørt øki) og yvirlitskort (mát 1:75.000), ið vísir leitikervi og møgulig leitimið.

b) Talva við upplýsingum um hesi viðurskifti:

| Hornakrosstøl fyri umsóknarøkið + navn á leitimiði ella leitikervi | [1]Mettar kolvetnisnøgdir (P90, P50, P10). Olja: $10^6$ $Sm^3$ Jarðgass: $10^9$ $Sm^3$ | Slag av kolvetnum | Fund-sannlíki | Goymslugrýti (jarðfr. dýpi) |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |

[1] Fyri leitikervi skulu tøl bert uplýsast, har tað ber til.